# Eysturkommunu býráð

## Býráðsfundur verður mánadagin tann 25. september 2017 kl. 20.00

**Fundarskrá:**

1. **17/00283 – Umsókn um loyvi at gera veg á matr. 278 í Leirvík oman á Kráarveg**
   Málið var fyri á seinasta býráðsfundi, men var tikið av skrá.

2. **17/00341 – Umsókn um sundurbýri av matr. nr. 38a Norðragøtu**
   Eigari av ogn matr. nr. 38a Norðragøta hevur saman við keypara sent umsókn um sundurbýri við at leggja mart. nr. 38a saman við ognini mart. 9 í Norðragøtu.

3. **17/00356 – Val av skúlastýrislimi – Framvit**
   Sambært sáttmálanum millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu um skúlasamstarv, skal Eysturkommuna velja eitt politikst umboð í skúlastýrið.

4. **17/00403 – Uppskot til at skúlagjald fylgir 10. floks næmingum**
   Skotið verður upp at næmingagjaldið, sum Eysturkommuna rindar til Fuglafjarðar kommunu fyri næmingar, sum ganga í framhaldsdeild í Fuglafjarðar skúla, fylgir næminginum um hann velur annað tilboð enn Fuglajfarðar skúla í 10. flokki.

5. **17/00399 – Eykajáttan til Nánd**
   Søkt verður um eykajáttan á ialt 700.000,00 kr., parturin hjá Eysturkommunu verður 352.096,00 kr.

6. **17/00347 – Umsókn um stuðul – Leirvíks Páll**
   Skótaliðið Leirvíks Páll søkir um stuðul á 60.000,00 kr.

7. **17/00346 – Søla/keyp av jørð í Leirvík**
   Mælt verður til at keypa 2 jarðarstykkir í Fløtugerði í Leirvík sum eru ialt 326 $m^2$

8. **13/00070 – Dagføring av bátahylinum í Norðragøtu**
   Í sambandi við ætlan um dagføring av bátahylinum i Norðragøtu, verður mælt til at gera nærri kanningar/simuleringar. Kostnaðurin fyri hetta er mettur til 248.000,00 kr.

9. **17/00364 – 1. viðgerð av fíggjarætlan 2018**
   Uppskot til fíggjarætlan frá fíggjarnevndini fyriliggur.

   Skotið verður upp at málið fer í føstu nevndinar til víðari viðgerð.